# FM vinnararnir enda í Sørvági

*Eingin uppløgd finala er á skránni í 18. og síðsta leikumfarinum í bestu deildini*

Leygardagin søgdu vit frá, at í fyrsta umfarinum í landskappingini, sum verður 24. apríl (2. páskadag) fáa meistararnir í KÍ vitjan av NSÍ. Vit søgdu eisini, at nýggja liðið í 1. deild, FS Vágar, í fyrsta umfarinum skal á Svangaskarð.

Leygardagin varð uppskotið til kappingarskrá lagt fyri feløgini, sum hava eina viku at gera viðmerkingar í. Dánjal Andreasen undirstrikaði í blaðnum leygardagin, at tað skulu góðar grundgevingar til at fáa skránna broytta, og hetta endurtók hann á ársaðalfundinum hjá FSF.

Tá kappingarnevndin leggur skránna eru nógv fyrilit at hugsa um. Viðhvørt er veruleikin, at talan í síðsta umfarinum verður um eina rætta finalu um FM ella niðurflyting. At leggja skránna soleiðis at hetta gerst veruleiki er sjálvandi vónleyst, tí tað er á vallunum kring landið og ikki á skrivaraborðinum hjá Dánjali Andreasen, at kappingin verður avgjørd.

**Síðsta umfarið**

KÍ vann meistaraskapin í fjør, og teir kunnu kalla seg meistarar inntil meistarin í ár 2000 er funnin.

Um klaksvíkingar fara at endurvinna meistaraskapin, so fara teir at fáa steypið handað í Sørvági. KÍ hevur vunnið meistaraskapin seytjan ferðir, men teir hava ongantíð vunnið hann í Sørvági.

Umframt FS Vágar og KÍ verða innanhýsis uppgerðirnar í átjanda umfarinum, sum verður leygardagin 30. september, hesar: B68–GÍ, B36–VB, Sumba–HB og B71–NSÍ.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at eingi av teimum fimm liðunum, sum í fjør endaðu á fimm teimum ovastu plássunum í 1. deild, skulu spæla móti hvørjum øðrum í átjanda umfarinum.

JH

# Stevnudystirnir

*Eins og undanfarin ár verður fótbóltslandskappingin partur í fleiri av summarstevnunum, sum verða hildnar kring landið alt summarið*

Seinnu árini hevur tað verið vanligt, at landskappingardystir hava verið spældir á summarstevnunum. Soleiðis verður tað eisini í ár.

Fyrsta stevnan verður norðoyarstevna. Hon verður 3. og 4. juni, og KÍ fær vitjan av sumbingum sunnudagin.

Skálafjarðarstevnan, sum teir á Skálafjørðinum kalla tað, ið aðrir nevna Eystanstevnu, verður 17. og 18. juni. Sambært skránni, sum varð býtt út leygardagin, skal B71 spæla í Runavík móti NSÍ leygardagin 17. juni.

Jóansøkan verður í Vági 24. og 25. juni. Hetta vikuskiftið verður farið undir seinnu helvt av landskappingini. Í fyrsta umfarinum skulu vágbingar spæla í Sumba, og tað hevur við sær, at á jóansøku verður grannauppgerð á Vágseiði millum VB og Sumba. Dysturin er settur til at vera sunnudagin 25. juni.

Havnarfeløgini spæla ongantíð í landskappingini á ólavsøku, tí síðst í juli er fótbóltskappingin framvegis í summarfrí. Einki lið í 1. deild er í Sundalagnum, har ein av summarstevnunum, sum telur við í FM kappróðrinum verður hildin.

Um vestanstevnan í ár hevði verið í Vágum, so er sjálvsagt væl hugsandi, at FS Vágar hevði spælt landskappingardyst á heimavølli henda dagin. Hetta kemur ikki upp á tal hesa ferð, tí í ár verður vestanstevnan í Vestmanna 15. og 16. juli. jh



*Aftur hetta árið verður fótbóltur at síggja á norðoyarstevnu, tá KÍ fær heimavøll í landskappingini*

# Talvini hesa vikuna

*HvÌtur: Eyðun Nolsøe, (2184)*

*Svartur: Brian Jørgensen, (2198)*

*Aktiv-Alliancen, 6. umfar*

1. e4 d5
2. exd5 Fxd5
3. Ric3 Fa5
4. d4 Rif6
5. Rif3 Bf5
6. Bc4 e6
7. Bd2 Bb4
8.O-O c6
9. Re1 O-O
10. Fe2 Ribd7
11. a3 Bxc3
12. Bxc3 Fc7
13. b4 Rid5
14. Bb2 a5
15. c3 Rif4
16. Fd2 Rib6
17. Bf1 Ria4
18. Bc1 Rid5
19. c4 Rif6
20. Rih4 Bg4
21. h3 Bh5
22. g4 Bg6
23. Rixg6 hxg6
24. Fc2 Rib6
25. Be3 Rfd8
26. Bg2 Rd7
27. Fb3 a4
28. Fc2 Fd8
29. Rab1 Ric8
30. b5 cxb5
31. Rxb5 Rid6
32. Rb4 Fa5
33. Reb1 Fa6
34. c5 Rc8
35. Rxa4 1-0

*HvÌtur: Heini Olsen, (2289)*

*Svartur: Ole Jacobsen, (2402)*

*KM, 8. umfar*

1. d4 Rif6
2. c4 e6
3. Rif3 c5
4. d5 d6
5. Ric3 exd5
6. cxd5 g6
7. e4 a6
8. a4 Bg4
9. Be2 Bxf3
10. Bxf3 Ribd7
11. Bf4 Fe7
12. O-O Bg7
13. Re1 O-O
14. Fd2 Rfe8
15. Be2 Ff8
16. Fc2 h5
17. Rad1 Bh6
18. Bg3 Rac8
19. Rf1 Fe7
20. Rde1 Rih7
21. h3 Bg7
22. f4 Bd4+
23. Kh1 h4
24. Bh2 Rihf6
25. Bf3 Ff8
26. Rie2 Fg7
27. Rixd4 cxd4
28. Fd2 Rc4
29. e5 dxe5
30. fxe5 Rih7
31. b3 Rc3
32. Fxd4 Rxb3
33. Fc4 Rb2
34. Fc7 Rihf8
35. Bg4 Rib6
36. e6 f6
37. e7 Rih7
38. Be6+ Kh8
39. d6 Rig5
40. d7 Rixd7
41. Bxd7 1-0

# Úrslit og Talvur

## 1.deild

| | |
|---|---|
| KLaksvíkar Talvfelag - Tofta Talvfelag: | 2,5 - 1,5 |
| Torbjørn Thomsen, 2150 - Jens K. Hansen, 2195: | _-_ |
| Bernhard Thomsen, 1970 - Helgi Joensen, 1805: | 1-0 |
| Hans K. Simonsen, 1720 - Wensil Højgaard, 1785: | 0-1 |
| Karl L. Johansen, 1665 - Justines Hansen, 1695: | 1-0 |

| | |
|---|---|
| Havnar Talvfelag - Sandavágs Talvfelag: | 3,5-0,5 |
| C.E.N. Samuelsen, 2040 - Torkil Nielsen, 2070: | _-_ |
| Haldur Johansen, 2035 - B. Augustinussen, 1820: | 1-0 |
| Herluf Hansen, 2015 - Gutti Petersen, 1560: | 1-0 |
| Martin Poulsen, 1905 - Heri Christoffersen, 1620: | 1-0 |

**Støðan eftir 9. umfør**

| | |
|---|---|
| 1. HT, Tórshavn | 26 |
| 2. KTF, Klaksvík | 22 |
| 3. KT, Kollafjørður | 16 |
| 4. TFS, Hvalvík | 14,5 |
| 5. ST, Sandavágur | 13 |
| 6. TT, Toftir | 12,5 |

(KTF og TFS hava telvað ein dyst minni)

## 2.deild

| | |
|---|---|
| Klaksvíkar Talvfelag 2 - Runavíkar Talvfelag: | 2,5-1,5 |
| Ingolf Gaard, 1700 - Meinhard Danielsen, 1795: | _-_ |
| Rúni Dragaberg, 1450 - Brandur Jacobsen, 1660: | _-_ |
| Óli Joensen, 1460 - Eyðun Lamhauge, 1550: | _-_ |
| Dánjal Ennistíg - Møtti ikki: | 1-0 |

| | |
|---|---|
| Vestmanna Talvfelag - Havnar Talvfelag 2: | 1,5-2,5 |
| John Rødgaard, 2330 - Michael Jensen: | 1-0 |
| John Jacobsen, 1940 - Olaf Berg, 1730: | 0-1 |
| Samson Højgaard, 1935 - Johan Gaard, 1810: | 0-1 |
| D.P. Højgaard, 1880 - Jógvan Næs, 1775: | _-_ |

| | |
|---|---|
| Klaksvíkar Talvfelag 2 - Havnar Talvfelag 2: | 2,5-1,5 |
| Ingolf Gaard, 1700 - Michael Jensen: | 1-0 |
| Esbern Christiansen, 1610 - Olaf Berg, 1730: | _-_ |
| Rúni Dragaberg, 1450 - Jóhan Gaard, 1810: | 0-1 |
| Óli Joensen, 1460 - Jógvan Næs, 1775: | 1-0 |

**Støðan eftir 9. umfør**

| | |
|---|---|
| 1. VT, Vestmanna | 18 |
| 2. HT 2, Tórshavn | 18 |
| 3. KTF 2, Klaksvík | 13 |
| 4. RT, Runavík | 12,5 |
| 5. HT 3, Tórshavn | 10,5 |

(HT 2 hevur telvað ein dyst meiri)

## 3.deild

| | |
|---|---|
| Gøtu Talvfelag - Rókur: | 2-2 |
| Vestmanna Talvfelag 2 - Havnar Talvfelag 5: | 4-0 |
| Havnar Talvfelag 5 - Klaksvíkar Talvfelag 3: | _-3_ |
| Havnar Talvfelag 4 - Gøtu Talvfelag: | 2_-1_ |
| Havnar Talvfelag 5 - Rókur: | 3-1 |

**Støðan eftir 9. umfør**

| | |
|---|---|
| 1. HT 4, Tórshavn | 25 |
| 2. VT 2, Vestmanna | 19,5 |
| 3. GT, Gøta | 18,5 |
| 4. HT 5, Tórshavn | 18 |
| 5. KTF3, Klaksvík | 17,5 |
| 6. Rókur, Oyri | 9,5 |

## Unglingar

| | |
|---|---|
| Klaksvíkar Talvfelag 1 - Havnar Talvfelag 2: | 1-3 |
| Klaksvíkar Talvfelag 2 - Havnar Talvfelag 2: | 0-4 |
| Klaksvíkar Talvfelag 1 - Havnar Talvfelag 1: | _-3_ |

**Støðan eftir 9. umfør**

| | |
|---|---|
| 1. HT 1, Tórshavn | 17 |
| 2. KTF 1, Tórshavn | 17 |
| 3. HT 2, Tórshavn | 10 |
| 4. KTF 2, Klaksvík | 0 |



# Spenningur í toppi og í botni

*Talv: Havnarmenn vunnu stórsigur á næstaftasta liðnum úr Sandavági, og tað viðførir, at øgiliga tætt er nú í botninum. Klaksvíkingar og hvalvíkingar telva níggjunda umfar komandi vikuskifti. Útisetar hava fingið góð úrslit í Danmark.*



CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Liðini bæði úr Havn og úr Sandavági høvdu bæði nakað serligt at stríðast fyri tá tey um vikuskiftið hittust yvir talvborðini. Havnarmenn ætla sær at vinna føroyameistaraheitið, sum teir seinast vunnu í 1995, meðan sandavágsmenn vilja gera alt fyri ikki at flyta niður í aðru deild.

Úrslitið bleiv 3,5-0,5 til havnarmenn, og tað kunnu teir verða væl nøgdir við. Hálva stigið sandavágsmenn fingu, fekk Torkil Nielsen móti Carl Eli N. Samuelsen. Talvið vardi bert sekstan leikir, men støðan var rættiliga vill og opin tá teir samdust um javnleikin. Torkil fór í langu borg, meðan hin fór í ta stuttu, og tað viðførir vanliga álopsspæl. Men beint sum kríggið varð á markinum bjóðaði Torkil remis, og Carl Eli takkaði.

Á øðrum borði vann Haldur S. Johansen móti Berhardi Augustinussen. Haldur hevði lítlan fyrimun í byrjanini og sum miðspælið nærkaðist vaks hesin fyrimunur. Haldur fekk snilt ognað sær finnu, og tá Berhard lat rókin hjá sær standa í deyða tímdi hann ikki meir.

Herluf Hansen vann eitt langt og javnt talv móti Gutta Petersen á triðja borði. Talvið varð javnt í miðspælinum, men tá Gutta misti sentrumsfinnu varð hann við undirlutan restina av talvinum. Gutti gavst ikki so, tí leingi helt hann á og tað varð ikki fyrri enn í fimta tíma at Herluf vann.

Martin Poulsen vann heldur lættliga móti Hera Christoffersen á fjórða borði. Heri rokaðist ov nógv við frúnnini og útviklaði ikki fólkið hjá sær, og tað skal ein ikki gera móti Martini.

Úrslitið merkir, at havnarliðið nú er fýra stig frammanfyri klaksvíkingarnar, sum tó hava leikt ein dyst færri. Teir úr Sandavági eru bert hálvt stig framanfyri Toftir, sum er aftasta lið.

**Kollfirðingar vunnu aftur**

Við Torbjørni og Berhardi Thomsen á odda hava kollfirðingar samlað sær heilt nógv stig saman teir seinastu dystirnar.

Hetta vikuskifti vunnu teir 2,5-1,5 móti botnliðnum av Toftum.

Á fyrsta borði leiktu fyrrverandi føroyameistarnar Torbjørn Thomsen og Jens Kristian Hansen javnleik. Jens Kristian stóð betri og fekk eisini eitt álop á føtur, men Torbjørn, sum oftani fær nógv burturúr ongum, fekk avbýtt tað mesta av fólkinum, og sjálvt um Jens Kristain royndi alt tað hann megnaði, varð javnleikur úrslitið.

Berhard Thomsen vann móti Helga Olsen á øðrum borði. Sera friðarligt løgdu teir út, men tá Helgi fekk eina dupultfinnu, tá slóg Berhard til. Berhard fekk eina frífinnu og hon avgjørdi talvið. Helgi hevði tó møguleikar at svara aftur, men hann varð ov óneyvur.

Hans Kristian Simonsen hevur havt heilt góð úrslit í ár, men móti Wenzeli Højgaard mátti hann lúta. Talvið bleiv ikki áhugavert fyrr enn í miðspælinum, tá satsaði Hans Kristian í javnari støðu, og tað varð ikki rætta valið. Wenzel leikti sikkurt og vann móti endanum trygt. Sigurin hjá Wenzeli varð hansara fyrsti í ár.

Á fjóðra borði gjørdi Jústines Hansen eitt avgerandi mistak móti Karl L. Johannesen og misti ein mann. Tá varð einki annað at gera hjá Jústinesi enn at gevast.

Kollfirðingar eru nú farnir framum hvalvíkingar á triðja plássi, men hava leikt ein dyst meir.

**2. deild**

Í aðru deild vórðu tveir dystir um vikuskiftið. Toppliðið úr Vestmanna tapti óvæntað 1,5-2,5 móti nærmastu kappingarneytunum, Havnini 2. Men vestmenningar verða ivaleyst aftur at síggja í fremstu deildini komandi ár, tí teir skulu bert hava hálvt stig í síðsta dystinum fyri at vinna deildina, og verður John Rødgaard við, er tað hálva stigið allarhelst tryggja.

Í Klaksvík vunnu klaksvíkingar 2,5-1,5 móti runavíkingum, og tað verða hesi liðini og Havnin 3 sum fara at stríðast undan niðurflyting.

**3. deild og Unglingar**

Manningin á Havnini 4 hava longu áðrenn síðsta umfar vunnu 3. deild. Tað tryggjaðu teir sær við at vinna 2,5-1,5 móti gøtumonnum. Tillukku við tí, Havnin 4!

Ógjørligt er at siga hvør vinnur hini heiðursmerkini, tí sera tætt er millum liðini. Havnin 5 er eisini við í tí stríðnum eftir at teir vunnu 3-1 á Róki.

Í Unglingadeildini varð avgerandi toppdystur millum Klaksvíkina 1 og Havnina 1. Havnin 1 vann stórsigur 3,5-0,5 og skulu, eins og vestmenningar í aðru deild, bert hava hálvt stig í síðsta dystinum fyri at vinna deildina.

Í Klaksvík hittust eisini Klaksvík 2 og Havnin 2, og hendan dystin vann Havnin 4-0.

**Heini Olsen gjørdi bart**

Keypmannahavnarmeistaraskapið endaði næst seinasta vikuskiftið, og í ár varð kappingin óvanliga jøvn. Heili seks av teimum tíggju luttakarunum kundu enda á ovasta tindi, og millum teirra vórðu Heini Olsen og John Arni Nilssen úr Føroyum. Tí varð spenningurin øgiligur undan síðsta umfari.

Heini leikti javnleik í síðsta umfarinum og endaði á einum flottum deildum øðrum plássi, meðan John Arni tapti móti vinnaranum av kappingini, Torben Sørensen. Teimum sum Heini deildi annað plássi við vórðu; Ole Jacobsen, trýfaldaður danmarksmeistari, og tann ungi Hendrik El-Kher. John Arni endaði á sætta plássi.

Nevnast skal at John Arni varð darvaður av sjúku tey síðstu umførini, og tað ávirkaði nógv telvingina hjá honum. Hann fekk bert hálvt stig tey síðstu trý umførini.

Heini vann eitt sera væl spælt talv móti Óla Jacobsen í áttanda umfari. Talvið er við í blaðnum.

**Eyðun nummar tvey**

Í opna almenna bólkinum í Keypmannahavnarmeistaraskapinum, ið kallast Aktiv-Alliancen, fekk Eyðun Nolsøe eitt trygt annað pláss. Hevði Eyðun, eins og Heini, vunnið síðsta umfar so hevði hann verið endaður ovastur, men javnleik mátti Eyðun taka til takkar við, og sostatt enda sum nummar tvey við sjey stigum av níggju møguligum. Talvið sum Eyðun vann í sætta umfari, er við í blaðnum í dag. Eyðun fangaði frúgvuna í miðspælinum.

Heini Danielsen royndist eisini drúgvur í almenna bólkinum, men eitt stig í trimum teimum síðstu talvunum varð ikki nóg mikið til heiðurspláss. Hann endaði sum nummar seks við seks stigum. 50 telvarar luttóku í almenna bólkinum

**Unglingar til Finnlands**

Norðurlandakappingin í talvi fyri skúlaungdómar verður í Finnlandi í døgunum 24-27. február.

Fimm telvarar fara úr Føroyum. Ingolf Gaard og Rúni Dragaberg, báðir úr Klaksvík, luttaka í bólkinum fyri teimum 17-20 ára gomlu. Martin Poulsen úr Havn og Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði luttaka í 15-16 ár bólkinum, meðan Olaf Berg úr Havn luttekur í 13-14 ár bólkinum.

Úr Danmark fara tvey sum umboða Føroyar til Finnlands. Talan er um Anders Nicolajsen sum luttekur í 13-14 ár bólkinum og Miriam F. Olsen sum luttekur í 11-12 ár bólkinum. Bæði hava føroysk foreldur, men búgva í Danmark.

Unglingarnir hava fingið støðuga venjing her heima frá IM John Rødgaard, og við unglingunum til Finnlands fer ferðaleiðari og talvvenjari, og hesin venjarin verður Flóvin Tór Næs.

**Flóvin í Danmark**

Flóvin Tór Næs hevði eina heldur ringa kapping í lukkaðu IM-kappingini í Dianelund.

Flóvin fekk tvey stig av níggju møguligum, fýra javnleikir og fimm tap. Men ein glotti varð tó tá hann leikti javnleik við svarta fólkinum móti stórmeistaranum Igors Rauzis, sum gjørdist nummar tvey í kappingini. Hesin Igors hevur nærum 2500 í styrkistali!

Flóvin sigur sjálvur, at einki bar til hjá honum í kappingini.

Tann 4. mars fer Flóvin til Budapest at telva í einari líknandi IM-kapping.

**Rógvi W. Rasmussen** telvaði í lægri bólki í Dianelund og endaði á jøvnum fyrsta plássi við 4,5 stigum av sjey møguligum. Rógvi fekk ringa byrjan, hevði eitt stig eftir trimum umførum, men telvaði eftir hetta stak væl og deildi at enda fyrsta plássið við trimum øðrum telvarum.



*Í farnu viku gekst ikki so væl hjá Flóvini, sum tað onkuntíð hevur gjørt, men kortini megnaði hann at fáa einstøk góð úrslit*